

*Laxness-garðurin, sum er kendur fyri sína hestaleigu. Eyðkendu hvítu húsini, sum Halldór Laxness og konan, Auður, lótu byggja, Gljúfrasteinn í fýratiárunum. Nærhendis skálanum, har Halldór vaks upp. Síðani Laxness doyði í 1998 og konan er farin á ellisheim, er heimið latið upp sum savn*

heiminum. Tað vísti ein kanning, sum eitt amerikanskt bókmentarit gjørdi fyri nøkrum árum síðani.

## Livandi leiðsögn

Vit leita niðan í sjálvt húsið. Í gongini hongur ein málningur eftir Jóhannesi Kjarval. Ein altartalva, sum bygdafólk á Norðurlandinum ikki skoyttu um. Jóhannes doyparin var ov ljótur, hildu tey. Halldor Laxness ognaði sær málningin í staðin. Einaferð málaði Kjarval yvirskegg á doyparan, men tað dámdi Laxness ikki, so nú sæst bara ein farri av skegginum, greiðir ein savnskvinna frá.

Við einum Appel I-poddi um hálsin fara vit á eina ferð um húsið. Leiðsøgnin um Gjúfrasteinn, skáldið og konuna, Auður, er so livandi, at vit síggja tey fyri okkum. Hann skrivar við høga pultin. Steðgar á. Tekur fremstafingur og tummilin upp til høkuna. Lítur út gjøgnum gluggan. Fettir sær á. Letur eyguni fylgja Kølduskvísl. Setur aftur blýantin á pappírið. Bókstavir, orð og tankar gerast til setningar. Til stuttsøgur og heilar skaldsøgur. Auður situr við síðuna av. Við skriviborðið og skrivar handritið á eini gamlari skrivimaskinu....

Í Gljúfrasteinni var lív. Nógv fólk vitja íslendingin, sum fekk virðislön Nobels í fimtiárunum. Halldór spælir á flyglið í stovuni, sum er klædd við viðarplátum. Nógv vindeygu. Tónabrot hoyrast á I-poddinum. Leiðsøgnin er áhugaverd og hon kann hoyrast á fleiri málum. Tú kanst seta ferðina upp ella steðga á. Hyggja teg um og halda fram.

Skaldið teknaði eisini og ein tekning frá unglingatíðini er at síggja á kamarinum. Tað liggur við síðuna av skrivistovuni. Ein lítil sólpallur er uttan fyri kamarið. Har plagdi Halldór ofta at standa og hyggja í kring, fáa vit at vita frá savnsvørðin. Áhugan fyri list síggja vit í málningum eftir Jóhannesi Kjarval, Ninu Tryggvadóttir, Svavari Guðnasyni, Örlygi Sigurðssyni og Asger Jorn. Ein málningur, sum ein norskur listarmaður hevur málað, stendur enn reyður, grønur og bláur í minninum. Auður var eisini listarkvinna og vevmyndir hjá henni prýða eisini rúmini. Bøkur, tekningar og málningar fjala næstan bróstini.

Henda fagra sunnudagin er friðarligt og eingi vitjandi ferðafólk. Vit fáa tí eina eyka frásøgn frá fryntliga bókamentafrøðinginum. Hon er ikki einsamøll. Savnið er væl skipað og fær stuðul frá ríkinum. Fimm savnsfólk - serfrøðingar av ymsum slagi - eru knýtt at savninum! Hon sigur, at Auður av og á vitjar Gljúfrasteinn. Hyggur seg um. Flytur okkurt tingi og fregnast. Hon býr í dag á ellisheimi i Reykjavík og hevur latið »hús skáldsins« til íslendsku tjóðina. Stórfingin gáva.

Hava gingið um húsið hjá Laxness. Ein stór uppliving. Hann var eisini útifólk og gekk mangan í náttúruni í Mosfellsdalinum. Gøtur snúgva seg framvið ánni, um gil og heyggjar. -Ein góður túrur, heldur bókmentafrøðingurin fyri. Men henda turin eiga vit á.

## Varðin Undir Varða

Undir Varða standa húsini hjá William og Lisu frá tríatiárunum. Oman fyri Viðarlundina. Við útsýni yvir »heimsins nalva«. Her skrivaði William skaldsøgur, stuttsøgur og yrkti. Bókaverk, sum fólk í milliónatali hava lisið. Skaldskapur hansara hevur sett Føroyar á heimskortið, hóast hann ikki fekk bókmentavirðislön Nobels.

William hevði alsk til tónleik. Vaks upp í tónlistarligum umhvørvi. Kundi seta seg við klaverið. Eins og Halldór. Okkurt tónlistarverkið hevur hann gjørt fyri bratsj og var góður stuðul hjá gamla musikkskúlanum.

William málaði, teknaði og klippti. Gav føroyskum listarfólkum íblástur. Skipaði fyri framsýningum. Og føroysk list prýðir veggir í húsunum Undir Varða. Eins og íslendsk list prýðir Gljúfrasteinn. Hann ummælti list og stundum vóru sjónarmið um list og andslív á prenti.

Hann var ikki bara »trøllaklipparin Undir Varða«, men er framvegis nógv lisin rithøvundur. Høgt í metum. Ein varði í føroyskari mentanarsøgu og andslívi.

Tað eru til taks samrøður við hann og filmsbrot við honum. Tilfar til eitt savn?

## Framvegis livandi umhvørvi

Henda sunnudagin var einki á skránni í Gljúfrasteinni. Tíverri, ásannaði savnskvinnan. Men stundum eru smærri tónleikaframførslur at hoyra.

Eisini lesa íslendsk skald og rithøvundar úr verkum sínum fyri áhugaðum. Gljúfrasteinn er ikki bara eitt savn, men ein lítil depil, karmur, um nútíðar tónlist og bókmentir.

Ja, ja. Íslendingar duga, ásannaðu vit, tá vit gingu tvørtur um túnið yvir til bilin.

Íslendingar leita higar og ferðafólk við áhuga fyri bókmentum ella mentanarsøgu Íslands leggja leiðina til Gljúfrasteinn. Eitt av mongu tilboðunum hjá ferðafólki, sum vitja grannarnar fyri vestan.

Sólin hevði fyrrapartin havt hug at kaga undan, men hann hevði drigið á luftina, og høgættarlotið var kalt, nú vit stóðu uttanfyri. Mentanarliga mett. Men nú var kósin sett móti býnum. Móti eini matstovu.

Víkin er ruskut, tá vit koma á Sjóvarvegin - Sæbrautina - men ein glæma frá seinrapartssólin gyllir eina herðu á Esju.....

## Williamshús

Vit lata tankanar taka okkum eitt ár fram í tíðina og skriva nú 2009.

Næsta ár eru hundrað og tíggju ár liðin síðani William Heinesen sá dagsins ljós í Bringsnagøtu. Fyrst í 2010 letur upp Williamshús - eitt savn um skaldið og listarmannin. Almennningurin fær nú hövi at síggja »hús skaldsins«. Har eru bókaverk hansara. Á fleiri tungumálum. Listarverk prýða bróstini. Eisini ber til at seta seta seg niður og hoyra og síggja ljóð- og filmsbrot.

Við einum I-poddi ber til at gera eina ferð um húsið og niðan í skrivismáttina, har brot eru at hoyra úr samrøðu við Zacharias Heinesen. Undir glasi ber til at síggja handrit. Skrivað á maskinu, men við nógvum handskrivaðum rættingum. Ljóstak eru av brøvum úr stóra brævaskiftinum millum hann og Jörgen-Frantz Jacobsen. Ein bókmentafrøðingur verður........

Í gamla úthúsinum er ein framsýning við blaðsamrøðum, ummælum og myndum, sum lýsa skaldið, samfelagskritikkaran, humanistin og humoristin.

Verður Williams-savnið veruleiki? Ella skulu vit bara lata íslendingar geva vitjandi eina uppliving og lata teir kunna ferðandi um heimskendа rithøvund teirra? Og hvør eigur skommina, tá onkur tilvildarligur keypir húsini Undir Varða til .....



*Johan Mortensen hugleiðir um, hvussu heimið hjá Williami Heinesen kundi verðið nýtt sum savn - Williamshús, eitt savn um skaldið og listarmannin. Almenningurin fær høvi at síggja »hús skaldsins«. Har eru bókaverk hansara. Á fleiri tungumálum. Listarverk prýða bróstini. Eisini ber til at seta seg niður og hoyra og síggja ljóð- og filmsbrot, skrivar Johan Mortensen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*